

**Føroyskar bíbliutýðingar**
*Setursrit 4*
Elsa Funding. Turið Sigurðardóttir, ritstjóri - 200 síður.
Elsa Funding er fyrsta føroyska kvinnan við gudfrøðiprógvi. Í høvuðsritgerð síni á Føroyamálsdeildini granskar hon føroyska bíbliutýðing frá byrjanini, í 1823, til í dag. Harumframt greiðir ritgerðin frá bíbliutýðing í Vesturheiminum gjøgnum øldirnar, m.a. verður greint, hvussu tvey høvuðssjónarmið standa hvørt móti øðrum: tað litterala sjónarmiðið, ið vil týða orð til annað og fylgja setningsbygnaðinum í frumtekstinum so nær sum gjørligt; og tað idiomatiska sjónarmiðið, ið miðar eftir at javnviga millum krøv frá bæði frummáli og týðingarmáli – sjónarmið, sum eisini taka tøk, tá ið føroyskt bíbliumál verður til.

**Kr. 228,-**



**Sæteren ved Argisbrekka**
*Økonomiske forandringer på Færøerne i vikingetid og tidlig middelalder*
Ditlev Mahler - 525 síður, myndir
Høvundurin, sum leiddi útgrevsturin niðanfyri Argisbrekku eystaru megin Eiðisvatn, greinar fornfrøðiligu úrslitini og ber fram prógvgrundir fyri, at talan er um eitt ærgi. Víst verður á, at ærgi vóru vanlig í Føroyum í víkingatíð og tíðliga í miðøld. Eisini verður samanborið við onnur lond í Norðuratlantshavi og víst, at ærgisbúskapur var rættiliga útbreiddur. Ærgisbúskapurin hvørvur her í 1100-1200 árunum, og ístaðin kemur tað slagið av seyðahaldi í haganum, sum vit enn kenna.

**Kr. 328,-**



**Guds orð ella orð um Gud**
*Tekstur og søga í Bíbliuni*
Hans Andrias Sølvará - 210 síður.
Í bókini varpar høvundurin ljós á nakað av tí, sum kritiska bíbliugranskingin er komin eftir. Greitt verður frá, hvussu bíbilsku tekstirnir eru vorðnir til og varðveittir gjøgnum øldirnar. Víst verður eisini á, at eingi upprunahandrit finnast av nøkrum bíbilskum teksti, og at m.a. onkrar av teimum kendastu søgunum, sum standa í Bíbliuni, eru lagdar aftur at seinni av kristnum avritarum. Hetta var so vanligt millum kristnar avritarar, at onkur granskari hevur nýtt myndina, at tað eru fleiri munir millum tey varðveittu handritini, enn tað eru orð í Nýggja Testamenti.

**Kr. 248,-**



**Adressumálið**
*Donsk-føroysk viðurskifti undir fyrra heimsbardaga*
Hans Andrias Sølvará - 172 síður, myndir
Bókin er um Adressumálið, sum tók seg upp í Føroyum í 1917 orsakað av truplu flutningsviðurskiftunum undir fyrra heimsbardaga. Málið, sum hevði við sær, at viðurskiftini millum danskar myndugleikar og føroysku sjálvstýrisrørsluna gjørdust spent, íbirtist, tá ið nakrir sjálvstýrismenn vegna Føroya fólk ætlaðu at venda sær til bretskar myndugleikar fyri at fáa hjálp viðvíkjandi vøruflutningi til Føroya. Málið gjørdist partur av donskum politikki eftir kríggið, tá ið ein donsk kanningarnevnd varð sett at gera umfatandi rannsóknir í málinum.

**Kr. 200,-**



**Hjarta uttan fylgisneyta**
*Herman Bang 150 ár. Essay*
Hanus Kamban - 75 síður.
Í bókini lýsir Hanus Kamban rithøvundin og menniskjað Herman Bang, hansara uppvøkstur, hansara andaligu fyritreytir og hansara bókmentaligu menning. Somuleiðis verður greitt frá hansara mongu ferðum og óróliga lívsmynstri. Greitt verður frá tí týdningi, hann fekk fyri europeiskar bókmentir, einamest tann týska rithøvundin og nobelvinnaran Thomas Mann. Til seinast verður greitt frá ferðini til USA, har Herman Bang andaðist, í Ogden í Utah, í januar 1912.

**Kr. 150,-**



**Fróðskaparrit 54**
*Dorete Bloch og Firouz Gaini, ritstjórar - 198 síður.*
Bókin inniheldur 11 greinir; 8 innan hugvísindi og 3 innan náttúruvísindi. Rithøvundarnir hesu ferð eru: Anna Maria Fossaa, Firouz Gaini, Sólfinn Hansen, Erica A. Hayfield, Jeffrei Henriksen, Sámal Matras Kristiansen, Ásmundur Nolsøe, Hjalmar P. Petersen og Eivind Weyhe

**Kr. 270,-**

Fróðskapur
Faroe University Press
Debesartrøð · Postrúm 209 · FO-110 Tórshavn · tel +298 352 500

Góðar jólagávur til alt húskið
**JESUS & MÓSES** í myndlistini



Áhugaverdar bøkur, ið taka okkum við til kendar søgur úr Gamla og Nýggja testamenti
– men her sæð gjøgnum klassisku heimslistina

PRÍSUR: 148 KR.

Føroya Skúlabókagrunnur
www.fsg.fo

*Jólagávan til allar føroyingar*
**FISKAR UNDIR FØROYUM**




PRÍSUR: 398 KR.

Fiskirannsóknarstovan
www.frs.fo
Føroya Skúlabókagrunnur
www.fsg.fo